**Radiomarkamót nr. 00 034 um Fixed Wireless Acces (FWA) í frekvensbandinum 10,150-19,700 GHz**

er galdandi fyri fylgjandi bond:

- 10,150-10,300 GHz
- 10,500-10,650 GHz
- 12,750-13,250 GHz
- 14,500-14,620 GHz
- 15,230-15,350 GHz
- 17,700-19,700 GHz

<u>Upplýsingar um frekvenstillutanir, sendiorku, loyvisviðurskifti v.m.</u>

Í Fixed Wireless Access (FWA) í frekvensbandinum10,150-19,700 GHz eru kanalætlanir v.m. sum síggjast í CEPT tilmælinum galdandi.

- ERC/REC 12-05
- ERC/REC 12-02
- ERC/REC 12-07
- ERC/REC 12-03

Hægst loyvda sendiorka fyri grundstøðir verður ásett sum krav í hvørjum einstøkum loyvi.

Í frekvensbondum, ið verða deild við fylgisveinatænastur, kann tó ásetast krav um, at hægst loyvda sendiorkan ikki má fara upp um 55 dW, smb. art. S21 í Radioreglugerðini hjá ITU.

<u>Loyvisviðurskifti</u>

Uppseting og rakstur av FWA-brúkaraterminalum (CPE) í omanfyri nevnda frekvensbandi kann fara fram uttan einstaklingaloyvi til frekvensnýtslu. Hettar er treytað av, at brúkaraterminalar einans verða nýttir undir eftirliti av einari FWA-trygdarskipan.

Uppseting og rakstur av einari FWA-grundarstøð í omanfyri nevndu frekvensum, krevur einstaklingaloyvi til frekvensnýtslu frá Fjarskiftiseftirlitinum.

<u>Samlagsmeting</u>

Uppfylling av týðandi krøvum nevnd í art. 3.2. í direktivi 99/5/EF kann fylgjast við at nýta fylgjandi harmoniseraða standard:

ETSI EN 302 326-2
Fixed Radio Systems; Multipoint equipment and Antennas Part 2: Harmonised EN covering the essential requirements of Article 3(2) of the R&TTE Directive for Multipoint Radio Equipment.

ETSI EN 302 326-3
Fixed Radio Systems; Multipoint equipment and Antennas Part 3: Harmonised EN covering the essential requirements of Article 3(2) of the R&TTE Directive for Multipoint Radio Antennas.